

*Sambært Sigfríð Joensen, so er Oddfríður Gregersen ættaður frá Tróndi í Gøtu. Tað skal nokk passa, so drívandi báðir hava verið! Her er Oddfríður saman við konuni Hjørdis leygardagin*

ini eitt gott dømi um liviumstøðurnar tá á døgum. Av tveimum ættarliðum við fleiri børnum í hvørjum av teimum, kom bert eitt barn við ætt undan.

## Modellið úr Tjørnustovu

Sambært Sigfríð eru vit í Tjørnustovu ikki ættaðir frá Tróndi. Men - tá ið listarmaðurin skuldi finna eitt modell til Trónd, ein mann við reyðum skeggi og hári, tá fall valið á júst ein Tjørnustovumann. Hetta er Bjørgheðin Jacobsen, langabbasonur Gøtu Jákup í Klaksvík, sum upprunaliga var borin til Tjørnustovufestið. Fyri hann tók beiggin Absalon við festinum. Fleiri hava eisini tikið til at teir líkjast!

Tað kann verða nevnt her, at listarmaðurin Hans Pauli Olsen er eisini ættaður úr Gøtu. Hann er ommusonur Elspu hjá Mikkjali í Barbustovu í Syðrugøtu. Hann var beiggi Petru, konu Absalon í Tjørnustovu.

## Sámal Petur var nakað serligt

Tá ið Sigfríður sjálvur nevnir Sámal Petur beiggja sín, vil eg eisini gera tað. Hann var tvey ár yngri enn vit og gjørdist bert 22 ára gamal. Men hann var serligur. Hann var sjúkur, og hann bert versnaði. Fyrst kundi hann fara í skúla til gongu, men seinni mátti hann hava trýhjólaða súklu. Áræði hevði Sámal Petur. Hann vildi gera okkurt og fekk sær ein lítlan bókhandil við hús. Eg minnist, at eg keypti Fiskiveiði-Fiskimenn hjá Erlendi Patursson frá honum.

Sigfríður sigur eisini, at Sámal Petur átti fleiri hundrað bøkur og ritgerðir, so ungur hann var. Hann hevði uttan iva sett sær spor, um honum var lív lagað.

## Hava gjørt seg galdandi úti í heimi

Gøta hevur eisini gjørt seg galdandi úti í heimi, og her kunnu vit bert halda okkum til grannalagið hjá Tróndi, har vit eru stødd. Eitt dømi er Elsa hjá Eliesari, uppvaksin í húsinum hjá Peri, nærmasta grannahús hjá Tróndi. Elsa hevur upplivað eitt tað ringastra ræðustýri í nýggjari tíð, nevniliga í Etopia. Her hevur hon nýtt stóran part av lívinum at linna um andaliga og tímiliga, ikki minst í ræðuligu kommunistatíðini 1974-82. Hetta er eisini ein partur av Gøtu søgu.

Eina ferð var eg á einum altjóða fundi í Vancouver Island vestast í Canada. Tá var eg úti fyri eini merkiligari tilvild. Tá vísti tað seg, at eitt av canadsku umboðunum var ættað av Tróndargrund, nevniliga úr Jákupsstovu. Umframt tað eru vit eisini skyldmenn. Tá var hetta Jón, sonur Anfinn hjá Katrinu i Jákupsstovu og Petur á Lækjuni í Syðrugøtu. Báðir hava gjørt seg galdandi hvør á sínum øki og hava gjørt Føroyum og Gøtu heiður. Tað eru fleiri onnur dømi.

## Gøtuskeggjar mugu gerast fólkaogn

Komast skal aftur til Sigfríð og bók hansara. Tað hevur leingi verið greitt, at Sigfríður er ein fróðarmaður. Tað sama var við foreldrum hansara, Marthu og Andreas Petur, sum hava dugað væl at greitt frá, og Sigfríður hevur dugað væl at sita undir.

Hetta er so komið fram í teimum greinum, sum Sigfríður hevur havt í bløðunum, og eru hesar virðismikil íkøst til Gøtu søgu.

Tað, sum ræður um við slíkum tilfari er at fáa tað givið út í bók, so tað verður meira tilgeingiligt hjá fólki. Nú er so fyrsta stigið tikið til eina Gøtusøgu við hesi bók, sum er eitt vælaverk. Ikki er tað minst fragd at síggja myndirnar í bókini. Stuttligt er at síggja hesi gomlu fólkini, sum ein minnist hálva øld aftur í tíðina. Tað er eingin ivi um, at henda bók verður fólkaogn í Gøtu. Tað ræður eisini um, at unga ættarliðið fer at ogna sær hana.

Nú skilst, at tað verður arbeitt við Gøtu søguni hjá Arnleyg Jacobsen, og hetta verður spennandi at síggja. Men royndir vísa, at søguskriving verður ongantíð liðug. Verður arbeitt við einum evni kemur altíð meira undan kavi. Og tá farið verður undir tað, kemur enn meira undan kavi. Tað er eisini tað hugaliga við slíkum arbeiði, at tað er so takksamt at fáast við. Tað er eisini stórur áhugi millum fólk fyri slíkum siðsøguligum tilfari.

Her er heldur einki at bíða við. Tær bestu keldurnar eru ofta tey elstu fólkini, og tað vita vit, at tey hava so ikki framtíðina fyri sær.

Sigfríður skal bara dríva á. Tað er nóg mikið at tríva í.



*Bjørgheðin Jacobsen, modellið fyri Trónd í Gøtu, inni í Tjørnustovu, haðani langabba hansara kom. Her er hann saman við konuni Nikolinu á Kamarinum og dótrini Aðalgunn*



*Tað var væl av fólki til staðar við framløguni av Gøtuskeggjum*

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Johanna Dorthea Jacobsen**

vanliga nevnd Johanna í Pállshúsi

andaðist á Landssjúkrahúsinum
sunnudagin 13. juli, 94 ára gomul.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
mikudagin kl. 18.00. Kistan væntast at vera
í Eiðis kirkju umleið kl. 19.30
Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Lis, Leif, Ivan og verdótturin**

Tey ið ynskja at minnast Johonnu, kunna lata Missiónshúsinum á Eiði eina gávu, konta í peningastovnunum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá kæra móðir, omma og vermóðir okkara

**Sigbjørg Jacobsen**

Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri kransar, blómur og heilsanir. Takk til øll,
sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til heimarøktina og palliativu deildina á
Landssjúkrahúsinum. Tøkk til Blindastovnin fyri
hjálpsemi og prest fyri troystarrík orð.
Tøkk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta
hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Janet og Eydna**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Jógvan (Agga) Durhuus**

Vestmanna

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri troystarrík orð, takk fyri blómur,
kransar og gávur.
Takk fyri alla hjálp til ervið.
Somuleiðis vilja vit takka tí stóra skara, ið fylgdi
honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Bjørg, Hanna, Jacklin og Bjarni**